## TILTØK

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

## BRÚDLEYP

Í dag, 3. juli kl. 14.00 giftast í Filadelfia í Havn, Gurið Groth Danielsen og Brandur V. Tómasson, bæði úr Havn. Receptión verður aftaná vígsluna, øll eru vælkomin. Døgurði á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Leygardagin 5. juli kl. 16.00 giftast í Prestagarðinum í Sandagerði Sondy N. Guðjónsson, Klaksvík og Jan-Here Simonsen, Eiði. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Leygardagin 5. juli giftast í Guldager Kirke Súsanna Maria Gudmundsson úr Norðragøtu og Stefano Bove, úr Formia, Italien. Br.adr.: Tvillingernes Kvarter 194 tv.

Leygardagin 12. juli kl. 11.00 giftast í Vágs kirkju Anna Borg Dahl og John Eystberg. Brúdleypið verður hildið í VB-húsinum kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 5. juli á tlf. 373015, 373017 ella 0045 32886808.

Leygardagin 26. juli kl. 10.00 giftast í Vágs kirkju, Barbara Brattaberg, Vágur og Pauli Trond Petersen, Vestmanna. Veitsla verður í VB-húsinum kl. 12.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu vinarliga siga frá á tlf. 374091 ella 574091 áðrenn 14. juli.

Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast í Hvalbiar kirkju, Poula Næs, Hvalba og Rúni Thomsen, Froðba, búsitandi á Eiði. Vælkomst verður í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma til veitsluna, verða biðin um at siga frá á tlf. 423393 ella 221133 innan 7. juli 2003.

## HEILSANIR



**Góði John**
Ja, John, tað er ikki altíð man hevur tað so gott ha....? Sum tað kanska kann síggjast her „Sjóverk ella hvat“ :) Men nú tann rætta húgvan... er komin, hevur tú tað nokk betri. So vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við HH-prógvinum tann 26. juni 2003.
**Heilsan systkini**



Her situr hon so avslappað og sms'ar. Neyvan er stóri føðingardagurin í hugaheiminum, tá hendan myndin var tikin. Vit fara at ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingardegnum.
**Heilsan hinar tú veit**



**Góða omman**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum. Vit gleða okkum til leygarkvøldið.
**Ynskja vit 3 ommubørnini**



**Góða Anna Petra**
So upprann stóra løtan vit so spentar allar hava bíða eftir. Men eitt skal tú vita - ikki sæst tað á tær :o)
**Heilsan frá bindiklubbanum**



Hendan deiliga sviskan fyllir í dag. Vit vita gott, at tit ikki trúgva tí, men 40 er hon blivin. Hjartaliga tillukku við degnum.
**Heilsan loppurnar**



**Hey Anna Petra**
Tillukku á 40 ára degnum.
**Ja, gita nú**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................
...................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

# Bilar

Nr. 123 • hósdagur • 3. juli 2003 • 77. árg.



*Mazda3 væntast at koma á marknaðin síðst á árinum. Smartur bilur og elegant design*

## Framleiðslan av Mazda3 er byrjað

**25. juni 2003 byrjaði Mazda Motor Corporation í Japan framleiðsluna av Mazda3, sum kemur at avloysa Mazda 323. Mazda3 verður frumsýndur á altjóða bilaframsýningini í Frankfurt í september**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Mazda vísa nú tær fyrstu endaligu myndirnar av Mazda3. Bilurin bleiv sýndur fram sum konseptbilur á bilaframsýningini í Geneve í mars undir navninum Mazda MX Sportif. Tað gongur hart fyri seg hjá Mazda í hesum døgum, nýggj modell koma á marknaðin so at siga hvørt ár. Fyrst kom Mazda6, síðan Mazda2 og RX8, og nú Mazda3. Talan er um ein bil, sum verður bygdur yvir sama plattform sum ein komandi Ford Focus. Mazda hava heilt broytt stíl, nú leggja teir seg eftir at gera familjubilar við sportligum designi og koyrieginleikum. Enn hava vit ikki nógvar upplýsingar um nýggja Mazda3, men roknað verður við, at hann t.d. kemur at fáast við einum framkomnum 2,0 litur motori, sum lýkur tey strongu japansku ULEV-umhvørviskrøvini (Ultra Low Emission Vehicle). Bilurin væntast at koma á marknaðin síðst á árinum.



## Mazda6 - nú aftur á goymslu

**Mazda6 hava fingið so ómetaliga góða móttøku, síðan teir komu á marknaðin í fjør. Hetta hevur ført við sær at hjá Berg Motors á Hálsi, hava tey ikki klára stóra eftirspurningin, men nú hava teir so nakrar bilar á goymslu**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Síðan Mazda6 komu á marknaðin í fjør, hevur eftirspurningurin verið so stórur, at bilasølan Berg Motors á Hálsi ikki hevur kunna nøkta tørvin í longri tíð. Tað er ikki einans her hjá okkum Mazda6 hava verið ringir at skaffa. Ein orsøk kann vera, at motorjournalistar og bilbløð hava givið Mazda6 so sera góð skotsmál, og bilurin hevur longu fingið fleiri heiðurslønir. Men nú eru so nakrir bilar á goymslu aftur, sum t.d. 1,8 LX sedan ið kostar kr.198.700, 1,8 GLX sedan ið kostar kr. 216.700, og 2,0 GLX ið kostar kr. 228.700. Frá Berg Motors verður sagt, at seinni í hesum mánaðinum koma Mazda6 við 2.0 litur common-rail turbodiesel motori við 136 hk.

